HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE

# Royndarveiða við gørnum á Føroyabanka í 2021

## Data frá dagbókum og mátibløðum

Tórshavn · Apríl 2022




**Dagunn H. J. Clementsen**

**Petur Steingrund**



HAVSTOVAN NR.: 22-05
SMÁRIT

# Innihald

Vísindaligar rannsóknir á Føroyabanka.................. 3

Øki og tíðarskeið ................................................ 3

Reiðskapur ........................................................ 3

Mistur reiðskapur ................................................ 3

Eygleiðari........................................................... 3

Hjáveiða ............................................................ 4

Útblak................................................................. 4

Skrásetingar ....................................................... 4

Ásetingar ............................................................ 4

Úrslit .................................................................. 4

Kort, grafar og talvur .......................................... 5

# Vísindaligar rannsóknir á Føroyabanka

Havstovan hevur, sambært § 51, stk. 1 í sjófeingislógini, sum eina av uppgávunum at menna fiskiskap og hevur, sambært § 51, stk. 2, loyvi at gera vísindaligar rannsóknir í føroyskum sjógvi.

Í 2021 skipaði Havstovan fyri 2 royndarverkætlanum saman við 2 ymiskum stigtakarum (Talva 1), har heitið á verkætlanunum var:

***Garnaveiða eftir havtasku á Føroyabanka***

# Endamál

Endamálið við royndarværkætlanunum var at kanna, um tað ber til at fiska havtasku á Føroyabanka í rakstarverdum nøgdum uttan at hjáveiðan av øðrum fiski gerst ov stór. Her verður hugsað um lønsemi undir teirri fortreyt, at garnaveiðan ikki hevur skaðiligar fylgjur fyri lívfrøðilig viðurskifti á Føroyabanka. Eitt annað endamál var at kanna, hvussu nøgdin av havtasku broytist gjøgnum árið.

Í hesum smáriti verða data frá veiðudagbókunum og mátibløðunum víst.

# Øki og tíðarskeið

Økið fevndi um Føroyabanka, frá tí grynsta og niðureftir (Mynd 1), tó ikki tað økið, sum longu er loyvt til vinnuliga veiðu. Tíðarskeiðini vóru ymisk fyri tey bæði skipini (Talva 1). Byrjað varð 17. mai 2021 og endað 20. okt. 2021.

# Reiðskapur

Rigging av gørnum, millum annað meskavíddir, varð gjørt í samsvari við galdandi ásetingar, samstundis sum hjáveiðan av toski skuldi vera so lítil sum gjørligt. Nøgdin av gørnum í sjónum (1400 gørn) skuldi ikki vera størri enn at øll gørnini kundu dragast upp á sama túri. Gørnini kundu ikki standa longri enn at allur fiskurin var í góðum standi.

# Mistur reiðskapur

Um gørn vórðu mist í sambandi við royndarverkætlanina, skuldi skipið gera sítt til, at tey vórðu fingin uppaftur. Um hetta ikki hevði eydnast innan tvær vikur hevði verkætlanin endað.

# Eygleiðari

Havstovan tryggjaði sær rættin at senda eygleiðara umborð á skipið. Eygleiðarin skuldi onga ábyrgd hava av, hvar og nær tað skuldi roynast, ella um verkætlanin átti at enda ella ikki. Skipið skuldi rinda kostnað fyri eygleiðaran, meðan hann var umborð sambært sáttmála fyri eygleiðarar.

Um tað ikki eydnaðist Havstovuni at fáa eygleiðara, kundi verkætlanin tó halda á fram, um skip og Havstovan blivu samd um tað og funnu eina aðra nøktandi loysn á spurninginum um eygleiðing og prøvatøku.

Eingin eygleiðari frá Havstovuni var við hesum báðum skipunum, so manningin stóð fyri allari prøvatøkuni umborð.

*Talva 1. Skip, sum luttóku í royndarverkætlanum við gørnum á Føroyabanka í 2021.*

| Skip/ Havnakenningarnr. | Radiokallimerki | Tíðarskeið |
|---|---|---|
| Gudrun KG 243 | XPVY | 27. jun. - 20. sep. 2021 |
| Túgvusteinur VN 86 | XPZH | 17. mai. - 16. jun., 21. sep. - 20. okt. 2021 |

## Hjáveiða

Um nøgdin av hjáveiðu av toski fór upp um 10% í vekt fyri fyrstu 14 dagarnar, skuldu átøk gerast fyri at minka um hjáveiðuna av toski. Um tað varð mett neyðugt, kundi Havstovan uppsiga avtaluna. Um hjáveiðan av øðrum fiskasløgum/dýrum gjørdist stór og/ella hetta varð mett at vera ein trupulleiki, kundi Havstovan uppsiga avtaluna.

Havstovan kundi, um hetta varð mett neyðugt, áleggja skipunum at flyta øki ella at gera onnur átøk fyri at minka um nøgdina av hjáveiðuni.

## Útblak

Útblak av matfiski (fiskur, sum undir vanligum umstøðum hevði farið í lastina) í sambandi við royndarverkætlanina gav Havstovuni grundarlag fyri at siga avtaluna upp við virknaði frá sama degi.

## Skrásetingar

Serlig skipsdagbók frá Havstovuni varð førd við nágreiniligum upplýsingum um knattstøður, tíðarfestingar og veiðu fyri hvønn trossa, sum settur varð. Eisini blivu prøvar av longd og vekt av ymsu fiskasløgunum í veiðuni tiknir. Havstovan lat skipunum prøvaørk, har skrásetingarnar skuldu førast inn.

Allar skrásetingarnar (skipsdagbók og prøvaørk) skuldu vera Havstovuni í hendi eftir hvønn túr og nýggjur túrur mátti ikki byrjast fyrr enn skrásetingarnar vóru latnar Havstovuni. Um ongar skrásetingar vóru komnar 14 dagar eftir, at túrurin endaði, ella um skrásetingarnar vórðu mettar at vera ófullfíggjaðar, gav hetta Havstovuni grundarlag fyri at uppsiga avtaluna.

## Ásetingar

Havstovan stóð sum formligur leiðari fyri verkætlanunum og heitti á stigtakararnar um at fremja royndarverkætlanirnar í verki.

Miðast skuldi ímóti, at fiskiskapurin við gørnum í sambandi við hesar royndarverkætlanirnar ikki darvaði øðrum fiskiskapi og ikki elvdi til óneyðuga ónøgd millum manna.

Havstovan tók onga ábyrgd av fíggjarligu viðurskiftunum hjá stigtakarunum í samband við royndarverkætlanirnar. Skipini áttu veiðuna, sum varð fingin, undantikið tær (smáu) nøgdir av fiski, sum vegna eina prøvatøku møguliga ikki kundu landast/seljast.

Royndarverkætlanirnar vóru ein vísindalig roynd, har endamálið er at fáa svar upp á ávísar ítøkiligar spurningar. Í hesum liggur, at royndarverkætlanirnar ikki neyðturviliga tóku vinnulig atlit ella atlit til, hvussu ein framtíðar fiskiskapur skal skipast.

Royndarverkætlanirnar geva stigtakarunum ongan eyka rætt til framtíðar verkætlanir av hesum slagi samanborið við framtíðar stigtakarar.

Royndarverkætlanirnar geva ikki øðrum framtíðar stigtakarum nakran sjálvsagdan rætt at kunna luttaka í samsvarandi verkætlanum.

Royndarverkætlanirnar geva ikki stigtakarunum nakran eyka rætt til eina møguliga framtíðar vinnuliga havtaskuveiðu á Føroyabanka í mun til framtíðar stigtakarar.

## Úrslit

Upplýsingarnar, sum Havstovan hevur fingið frá skipunum við royndarloyvi, eru skrásett í dátugrunni á Havstovuni. Talan er um veiðudagbøkur og mátibløð við upplýsingum um longd og vekt fyri ymisk fiskasløg. Hesi verða her víst við kortum, grafum og talvum.

# Kort, grafar og talvur




*Mynd 1. Garnasetur pr. skip (ovaru myndir) og samlað (niðara mynd) á Føroyabanka í 2021, her teknaðar sum beinar linjur millum byrjanar- og endapositión. Svarta linjan vísir royndarøkið.*




*Mynd 2. Longd móti vekt fyri havtasku, tosk og longu frá royndarveiðu á Føroyabanka í 2021. Vektin er kruvd vekt hjá Gudrun og rund vekt hjá Túgvusteini.*




*Mynd 3. Longd móti vekt fyri kalva, hvasshvoysu, nebbaskøtu og hýsu frá royndarveiðu á Føroyabanka í 2021. Vektin er kruvd vekt hjá Gudrun og rund vekt hjá Túgvusteini.*

*Talva 2. Veiða upp á roynd (CPUE) pr. skip og sum miðal fyri bæði garnaskipini á Føroyabanka í 2021.*

| | kg/garn/døgn | | |
|---|---|---|---|
| | Havtaska | Toskur | Longa |
| Gudrun KG 243 | 1,59 | 0,10 | 0,01 |
| Túgvusteinur VN 86 | 1,74 | 0,11 | 0,03 |
| Í miðal | 1,68 | 0,11 | 0,02 |

*Talva 3. Skrásett fiskasløg og veidd nøgd av teimum frá veiðudagbókunum, umframt tal av mátaðum fiskalongdum og fiskavektum.*

| Fiskaslag | Kg | Tal longdarmát | Tal vektmát (rund) | Tal vektmát (kruvd) |
|---|---|---|---|---|
| Havtaska | 204785 | 2479 | 1357 | 1119 |
| Toskur | 12920 | 443 | 121 | 322 |
| Longa | 3009 | 161 | 60 | 100 |
| Skøta øll | 2600 | 9 | | 9 |
| Hvasshvoysa | 1313 | 108 | 12 | 96 |
| Nebbaskøta | 734 | 213 | | 213 |
| Hýsa | 563 | 112 | 28 | |
| Upsi | 524 | 35 | 10 | |
| Naglaskøta | 298 | 34 | | 34 |
| Kalvi | 157 | 18 | 7 | 11 |
| Blálonga | 144 | | | |
| Annað | 60 | | | |
| Brosma | 7 | 3 | 1 | |
| Hvítingur | 4 | 3 | | |
| Íalt | 227118 | 3618 | 1596 | 1904 |




*Mynd 4. Miðal veiða upp á roynd (CPUE) frá dagbókunum fyri havtasku pr. mánað í 2021. Litirnir sipa til, hvar ið gørnini hava staðið ávísa mánan í Mynd 5.*




*Mynd 5. Garnasetur littar eftir mána á Føroyabanka í 2021. Svarta linjan vísir royndarøkið.*

P.O. Box 3051 · Nóatún 1
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands

Tel +298 35 39 00
hav@hav.fo
www.hav.fo